

www.oljan.fo

**Jan Müller** 06 - 06 - 2012

# Tórsborg til Føroya 30. juni

Fjórða frálandaskipið hjá Supply Service í Lorvík, Tórsborg, kemur til Føroya um góðar tríggjar vikur. Leygardagin 30. juni verður stórt hátíðarhald á Vestaru Bryggju í Havn. Skipið verður navngivið klokkan 14. Eftir tað er opið skip og um kvøldið er hátíðarhald í Norðurlandahúsinum fyri innbodnum. Tórsborg er fjórða frálandaskipið, sum Supply Service letur byggja á Havyard skipasmiðjuni í Noregi. Hini skipini, sum føroyska frálandareiðaríið hevur latið byggja til at arbeiða í hesi vinnuni, eru Eldborg, Saeborg og Sjóborg. Hesi fýra skipini standa í umleið 1,2 mia. Kr. Tey geva arbeiði til umleið 100 føroyingar umborð umframt arbeiðsplássini, sum virksemið á skrivstovuni í Føroyum gevur. Henda verður í næstum flutt úr Leirvík til Havnar, og sama er galdandi fyri skipini, sum fara at verða skrásett í høvuðsstaðnum. Myndatøka - Supply Service.